UTTAN ÚR HEIMI

# Háhús kunnu elva til jarðskjálvta

**Ein jarðfrøðingur vil vera við, at hægsti bygningurin í heiminum kann elva til jarðskjálvta**

TAIWAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Við sínum 508 metrum er "Taipei 101" í taiwanska høvuðsstaðnum Taipei hægsti bygningur í heiminum. Hann vigar 700.000 tons og er gjørdur soleiðis, at hann kann tola ein jarðskjálvta, sum er 7,0 á Richter-stiganum.

Men nú sigur jarðfrøðingurin Lin Chang-Hong á lærda háskúilanum í Taipei, at í veruleikanum kann bygningurin sjálvur elva til jarðskjálvta. Í einari grein í tíðarritinum Geophysical Research Letters skrivar hann, at síðani "Taipei 101" bleiv bygdur, hevur jarðfrøðistovnurin í býnum skrásett munandi fleiri smáar skjálvtar enn frammanundan.

Økið kring taiwanska høvuðsstaðin verður ikki hildið at vera eitt serliga virkið jarðskjálvtaøki, men Lin vísir á, at undirgrundin er rættiliga bleyt, og at "Taipei 101" er so tungur, at tað kann seta hol á ballónina, sum hann tekur til.

- Kemur ein riva í undirgrundina av tí stóra trýstinum frá bygninginum, skal lítið til afturat, at vit fáa ein jarðskjálvta. Vit kunnu bera tað saman við tað kenda orðatakið um bikarið, sum er fult, áðrenn tað flýtur yvir, skrivar Lin í greinini. Hann skrivar eisini, at síðani tann stóri bygningurin varð bygdur fyri tveimum árum síðani, hevur jarðfrøðistovnurin mátað tveir skjálvtar beint undir honum. Soleiðis var ikki frammanundan, sigur hann.

- Verður hetta lagið frameftir, so er stórur vandi fyri, at bygningurin kann elva til ein harðan jarðskjálvta, skrivar taiwanski jarðfrøðingurin. Aðrir jarðfrøðingar ivast, men teir ávara tó ímóti at byggja ov høgar og tungar bygningar í økjum, sum kunnu verða rakt av jarðskjálvta. Eitt nú hava teir ávarað eina japanska fyritøku, sum ætlar at byggja ein 1.000 metrar høgan bygning.



*"Taipei 101" er so tungur, at hann kann elva til jarðskjálvta í Taiwan, heldur ein jarðfrøðingur*
*Mynd: Reuters*

# Tosa toruljós sínamillum?

**Rúmdarmenn, sum hava sæð toruljós úr erva, hava fleiri ferðir spurt, um tey munnu tosa saman.**

NÁTTÚRA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Toran og toruljós hava altíð fingið fólk at undrast á margfaldnið í náttúruni, menn enn er kanska okkurt, sum vit ikki vita um hesi fyribrigdi. Fleiri av rúmdarmonnunum, sum hava malið kring Jørðina tey seinastu 40 árini, hava sæð toruljós úr erva, og fleiri teirra hava sagt, at tað tóktist, sum at toruljósini høvdu samband sínamillum, sjálvt um fleiri hundrað kilometrar vóru ímillum teirra.

Spurningurin er so, um tað er so, og tað hava ísraelski professarin Yoar Yair og felagar hansara á Open University í Ísrael nú kannað við upptøkum hjá amerikonsku rúmdarferjuni Columbia.

Í einari grein í tíðarritinum Science skrivar Yoar Yair, at sambært kanningunum er eitt ella annað samband ímillum toruljósini. Spurningurin er, hvat samband talan er um, og teir ísraelsku granskararnir halda, at eitt toruljós sendir elektromagnetiskar bylgjur niður á Jørðina, og at tær verða slongar uppaftur í luftina og elva til toruljós aðrastaðni. Hetta er ikki óhugsandi, sigur Yoar Yair, sum tó viðgongur, at kanningarnar vísa ikki, at eitt toruljós kann elva til eitt annað toruljós fleiri hundrað kilometrar burturi.

- Men kanningar okkara benda á, at eitt ella annað fjalt samband er, skrivar hann í Science.



## Moskva steðgar útvarpi

Russisku myndugleikarnir eru ikki so fegnir um alt, sum russar kunnu hoyra á teimum vesturlendsku útvarpsrásunum, og tað fingu fleiri útvarpsstøðir at kenna í døgunum undan jólum. Tá misti týska støðin Deutche Welle rættindini at senda í Moskva, og støðir sum bretska BBC, franska RFI og tann kristna útvarpsstøðin Trans World Radio høvdu eisini trupulleikar í Russlandi.

Deutche Welle er almenn týsk útvarpsstøð, og tí kemur tað heldur óvart á tey flestu, at russisku myndugleikarnir hava sýtt fyri at leingja sendiloyvið hjá støðini, skrivar blaðið Handelsblatt. Blaðið vísir á, hvussu góð viðurskiftini millum Týskland og Russland hava verið tey seinastu árini, og at Vladimir Putin, forseti, og fyrrverandi týski kanslarin Gerhard Schröder hittust javnan.

Deutche Welle hevur havt sendiloyvi í Russlandi í tíggju ár, og sambært stjóranum, Miodrag Soric, hevur støðin ongantíð havt trupulleikar við teimum russisku myndugleikunum fyrr. Men í seinastuni hava ávís tekin verið um, at ein broyting var á veg, skrivar Handelsblatt og vísir á, at ein av ráðgevunum hjá Putin hevur lagt tær vesturlendsku útvarpsstøðirnar undir at virka sum undir kalda krígnum.

Tað er eingin ivi um, at sendingarnar hjá týska útvarpinum eru væl umtóktar í Russlandi, tí tá støðin tagnaði tann 21. desember, ringdu fleiri hundrað fólk í Moskva at vita, hvat bagdi.

## Hitler skuldi í elektriska stólin

Bretski forsætisráðharrin undir seinna heimsbardaga, Winston Churshill,. duldi ongantíð fyri, at hann var harðliga ímóti øllum tí, sum týski leiðarin, Adolf Hitler, stóð fyri.

Nú er komið fram, at Churchill ætlaði at geva sínum monnum boð um at beina fyri Hitleri, eydnaðist tað bretum at taka hann á lívi. Í einum skjali, sum stjórnarskrivarin Norman Brook skrivaði undir krígnum, verður Churchill endurgivin fyri at siga, at "Hitler skal drepast, eydnast tað okkum at taka hann til fanga". Sambært skjalinum hevði Churchill eisini gjørt sær sínar tankar um, hvussu týski leiðarin skuldi avrættast, tí har stendur, at bretar skuldu útvega sær ein elektriskan stól úr USA, og at hann skuldi brúkast til at seta Hitler í.

Skjøl, sum bretsku myndugleikarnir hava givið almenninginum at gongd til, vísa, at tey seinastu stríðsárini tosaðu teir bretsku ráðharrarnir um, hvørja viðferð teir týsku leiðararnir skuldu fáa, tá teir komu fyri rættin aftan á kríggið. Tað sæst, at ein av ráðharrunum helt tað vera óneyðugt at draga Hitler fyri rættin, og at tað rætta var at taka hann av døgum uttan rættarmál. Hesum var Churchill samdur við ráðharranum í, tí eftir hansara tykki kundi eitt rættarmál ímóti Hitleri elva til óneyðugar trupulleikar stendur í skjølunum.

Men tað eydnaðist ikki bretum ella nøkrum øðrum at taka Hitler á lívi, tí hann valdi sum kunnugt at taka lívið av sær. Tað sama gjørdu nakrir av hinum týsku leiðarunum, men fleiri endaðu í rættinum og fingu harða revsing.

## Elsta æðan deyð

Í Danmark hava náttúrumyndugleikarnir kunngjørt, at tann elsta æðan í Danmark er deyð. Hon var 28 ára gomul.

Tann gamla æðan varð funnin á einari strond við Stórabelti í februar. Tað vísti seg, at hon var illa dálkað av olju, og hóast drúgvar royndir at bjarga henni doyði hon nakað seinni. Hendan æðan sá dagsins ljós á fyrsta sinni í Finnlandi í 1976, og sambært finsku myndugleikunum var hon minst tíggju ferðir aftur og vitjaði har.

Vanliga livir æða eini 1- 15 ár, men tað hendir meiri enn so, at summar gerast nógv eldri. Sambært teimum kønu á økinum var æðan, sum doyði í februar, tann elsta, sum er skrásett í Danmark. Elsta æðan, sum menn vita um í Evropa, livdi í 37 ár.



*Elsta æðan í Danmark er deyð. Hon var 28 ára gomul.*